Fylgiskjal 5

LANDSVERK

Heilsu- og Innlendismálaráðið
Eiragarður 2
100 Tórshavn

24. mai 2018

**KANO**
Journalnr. 18/00318-4

**Ummæli til uppskot til løgtingslóg um fyrisiting av margfeldinum í náttúruni (Náttúrumargfeldislógin)**

Landsverk hevur gjøgnumgingið uppskotið til Náttúrumargfeldislógina, og eru vit samd í at tørvur er á lógini. Lógin hevur tó nógvar ásetingar um standardir, sum fyrisitið eigur at verða eftir, og tekur tað helst rúma tíð, áðrenn eitt nóg væl undirbygt vitanargrundarlag fæst, royndir og kunngerðir, sum kunnu geva fyrisitingini ítøkiligar ásetingar at fyrisita eftir. Mest týðandi meginreglan fyri fyrisitingina smbr. Náttúrumargfeldislógini er tó varðsemisskyldan, sum stovnar longu nú kunnu taka til sín. Eisini verður mett, at tað er ein fyrisitingarligur fyrimunur, at tað framyvir verða fakfólk, ið skulu umsita loyvisheimildirnar hjá friðingarmyndugleikunum.

Landsverk hevur ikki aðrar viðmerkingar til uppskotið til nýggja Náttúrumargfeldislóg.

Vinarliga
**Karina Nattestad Nolsøe**